

*Ræðuligi illgrunin er gingin upp fyri »Mariu«. Dóttirin er vorðin kynsliga misnýtt av pápa sínum*
*Modellmynd: Jens Kristian Vang*

fortelur um tær mongu ferðirnar, hon er vaknað, meðan hann hevur kynsliga samlegu við sær.

Hann tvíheldur um, at hann svevur og veit tí ikki, hvat hann ger. Og sjálvt um Maria ikki altíð hevur trúð honum, so hevur hansara frágreiðing gjørt tað lættari hjá henni at lata hjúnarlagið halda fram. Tað týdningarmesta er at varðveita familjuna, sum hon altíð hevur droymt um at hava.

Anna er skelkað. Men Maria hevur meira at fortelja vinkonuni, tí Kim hevur ein dóm, sum bert fá kenna. Tá hann var 16 ára gamal, varð hann dømdur fyri at hava gjørt seg inn á fýra gentur. Hann hevði følt tríggjar í skrevið uttaná klæðunum og roynt at tikið buksurnar av tí fjórðu.

Vinkonan ógvast og roynir at fortelja Mariu, at tað, Kim hevur gjørt, er skeivt. Og Anna kemur til eina niðurstøðu: "Tað býr ein krenkari í honum."

Maria kennir seg lættari aftaná prátið við vinkonuna, men hon er framvegis stúrin, tí tey seks orðini hava brent seg føst í minni hennara.

Onkuntíð er tað ringt hjá Mariu at skilja, hvussu hon bara hevur latið standa til í so nógv ár. Men hvørja ferð verjir hon tað við, at Kim er maður hennara, sum hon skal liva eitt eydnuríkt lív saman við. Hann er pápi at børnum teirra, og Maria heldur, at hon svíkir Gud, um hon brýtur hjúnabandslyftið.

Men nú skal Maria ikki leita eftir svarum. Í fleiri mánaðir hevur hon fingið frið um náttina, tí hon hevur sagt við hann, at um hann rørir hana aftur, so rýmir hon. Og tað hevur hjálpt. Men aftaná telefonsamrøðuna við Onnu er hon vorðin illgrunasom. Hví er hann steðgaður nú, um tað býr ein krenkari í honum?

## Ósvitalig tekin

Maria melur í einum meldri av tonkum. Hon hugsar nógv um tað, Anna segði í telefonini, men hon trýr ikki, at Kim er ein krenkari. Og um hann er, hvat merkir tað?

Tankin um, at Kim krenkar eina aðra, hevur streyfað hana. Men tað megnar hon skjótt at skúgva til viks.

Uttan at hon sjálv vil, endar hon aftur í sama leiklutinum sum kona og mamma í eini familju í upployssn, har allar stúranir verða riknar á dyr.

Men Lisa er framvegis ikki til at hava við at gera, og hon hevur tað ikki betri. Heldur tvørturímóti. Maria veit, at dóttirin skrivar "Brekaði babba, eg hati teg!" inni á heimasíðuni, Arto. Tað ger aftur Mariu illgrunasama, men eisini tað fortreingir hon, inntil hon ein dag aftur verður mint á undarligu atferðina hjá dóttrini, tá telefonin ringir.

Tað er Mia. Hon er mamma Sáru, ein floksfelag og vinkonu hjá Lisu.

"Eg veit ikki, hvussu eg skal siga hetta. Men ert tú greið yvir, at Lisa hevur ein trupulleika? Dóttir mín hevur fortalt, at Lisa sker seg í armin, og at hon hevur tosað um at gera sjálvmorð."

Maria verður forargað. Sjálvt um hon gerst skøkk, berjist hon fyri at varðveita fasaduna. Hon er fáorðað og avvísandi. Lisa hevur ikki nakran trupulleika, sannførir hon seg sjálva um.

"Eg helt bara, at tú skuldi vita tað," sigur Mia, og rørið verður lagt á.

Seinni tann dagin spyr Maria dóttrina um tað, Mia fortaldi, er satt. Lisa noktar. Hennara frágreiðing ljóðar, at hon hevur gjørt tað fyri at gera vart við seg sjálva. Maria trýr henni. Og hennara støðuga stremban eftir tí fullkomu familjuni heldur fram.

## At síggja sannleikan

Trupulleikarnir í familjuni rúgva seg upp. Og líkamikið, hvussu Maria roynir at lata sum einki er hent, ber ikki til at nokta støðuna, familjan er í. Tað skilir hon eftir enn eina samrøðu við vinkonuna Onnu.

Hon fær Mariu at skilja, at Lisa ikki bara hevur vanligar tannáringa-trupulleikar. Hennara atburður fær allar klokkurnar hjá Onnu at ringja. Hon er útbúgvin námsfrøðingur og arbeiðir sum familjuráðgevi í kommununi. Í sínum arbeiði hevur hon fleiri ferðir upplivað børn við somu atferðartrupulleikum.

"Tú noyðist at finna útav, um nakar hevur gjørt nakað við Lisu. Tað er tín ábyrgd sum mamma."

Maria drálar.

"Jamen, hvussu kann eg spyrja um tað?" spyr hon.

"Tú skalt spyrja hana, um nakar hevur

*Framhald á næstu síðu*